# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur**
**Leygardagin 6. jan. 2007**
***Trettandakvøld:***
***Vesturkirkjan:*** kl. 20, Bergur D. Joensen. Talvan gongur fyri útimissión (heidningamissión).
***Hestur:*** kl. 20, Heri Joensen
***Hósvík:*** kl. 20,
***Eiði:*** kl. 19 Emil Olsen (samvera við Eliesar Jacobsen (Essa) í Karmel aftaná).
***Sandavágur:*** kl. 20 David Johannesen
***Selatrað:*** kl. 20 ***(talvan gongur fyri heidninga-missiónina)*** Jógvan Fríðriksson
***Fuglafjørður:*** kl. 20, Uni Næs
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 20 Martin R. Jacobsen ***(Talvan gongur fyri Ytri missión)***
***Gamla Kirkjan í Norðragøtu:*** kl. 20 Deknagudstænasta ***(Talvan gongur fyri kirkjuliga missiónsfelagið)***
***Christianskirkjan:*** kl. 20, Elsa Funding

**1.s.e.trettanda:**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11, Bergur D. Joensen
***Argja kirkja:*** kl. 11, Heri Joensen
***Sørvágur:*** kl. 12, altargongd – Inga Poulsen Dam
***Bøur:*** kl. 12 altargongd David Johannesen. ***Talvan gongur í Vága prestagjaldi fyri Heidningamissiónina.***
***Skálafirði:*** kl. 10.50 Jógvan Fríðriksson.
***Sjóvar kirkja:*** kl. 12, altar-gangur, Jógvan Fríðriksson
***Eiði:*** kl. 12 messa Emil Olsen
***Elduvík:*** kl.12, altargongd, Uni Næs
***Hellurnar:*** kl. 17, altargongd, Uni Næs
***Í Fuglafjarðar prestagjaldi gongur talvan fyri kristniboðan kirkjunnar.***
***Norðskáli:*** kl. 12 John Myllhamar
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11, altarg., Martin R. Jacobsen
***Christianskirkjan*** – lestur
***Klaksvíkar sjúkrahús:*** kl. 10,
***Norðoya Røktarheim:*** kl. 14.30, Elsa Funding. ***Í Norðoya vestara prestagjaldi gongur talvan fyri kristni-boðan í øðrum londum.***
***Sjúkrahúsið á Tvøroyri:*** kl. 14 + altergang,
***Ellisheimið:*** kl. 16 + alter-gang, Patrick de Neergaard
***Hvalba:*** kl. 12.30 presta-innsetan av Jette Paarup við Jónsvein Bech.

**Havnar Kirkja**
***Fríggjakvøldið 5. januar***
Aftankvirra kl. 21-23.
Kl. 22.00 spælir Ólavur Jakobsen guitar.
Kl. 22.30 andakt Theodor D. Olsen stud. theol.

**Vesturkirkjan - Heystkonfirmantar**
Fríggjadagin 5. januar kl. 15.00 møta konfirmantarnir heystið 2007 í Suðurstreym-oyar vestara prestagjaldi og verða skrivaðir inn. Havið navna- ella dópsbrævið við.

**Lívdin á Brekku 3**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 ungdómsmøti har Høgni Johannesen talar um »At byrja av nýggjum«.

***Sunnumorgunin í Hoyvíkar skúla***
kl. 10.30 Familjumøti har Jógvan Z. talar um »Ávøkstur Andans: Inngangur«.
Kl. 11.30 samfelagsløta
Kl. 12 Tilbiðjunarmøti har Kristian Hansen talar um evnið »Virði teirra heilagu« Undir báðum møtinum er barnaansing fyri børn undir skúlaaldur.
Kl. 12 Sunnudagsskúli
Møtini kunna hoyrast beinleiðis á www.livdin.fo
Týskvøldið samlast húsbólkarnir.

**Havnar Kirkja**
***Heystkonfirmatiónirnar***
2007 verða 7. oktober og 14. oktober. Konfirmantarnir skulu møta í Havnar Kirkju ***týsdagin 9. januar kl. 15***. Markið millum eystaru og vestaru sókn er Tróndargøta, Varðagøta, Villingardalsvegur.

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti 4**
Hóskvøldið kl. 20 ungdóms-møti, sunnudagin kl. 11 Guðs-tænasta v/Valdemar Simonsen evni: At hava kærleika til sannleikan í Guðs Orði, kl 14 sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20 felags bønarmøti í Filadelfia.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 barna-bíbliutími og bíbliugransking.
Kl. 11 gudstænasta, J.V. Danielsen.

**Missiónshúsið við Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20 Møti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnu-dagsskúli á Norðasta Horni, kl. 18 Møti.

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Møti: Sunnumorgunin kl. 10.30 Breyðbróting.
Sunnukvøldið kl. 18 Evangel-iskt møti.
Mánakvøldið kl 20 Bønar/ uppbyggingarmøti.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Leygarkvøldið kl. 21 Flare.
Sunnudagin kl. 10.45 Morgunmøti, Tummas Jacobsen talar,
kl. 11.30 Barnagudstænasta.
Mánadagin kl. 20 felags bønarfundur.

**Katólska Kirkjan**
Hóskvøldið 4. januar kl. 20 Taizé-bøn í Kerit.
www.katolsk.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudag kl. 11 Møti.
Sunnudagsskúli kl. 14. Bøn kl. 17.30. Møti kl. 18.
Mánadag verður skótamøti kl. 18.30 fyri smáskótar og skótar.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11 fam-ilju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl. 18 felags-møti við sjónvarpsupptøku.
Mánakvøldið kl. 20 felags bønarmøti í Filadelfia.
www.gospel.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin 8. jan. kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Emil Olsen, evnið: Apostlasøgan.
Týsdagin kl. 17 Várgleði fyri børn.

**Tórshavnar Hvítusunnu-samkoma, Yviri við Strond**
Einki møti fyrr enn 7. januar 2007.

**Sjómanskvinnuringurin í Havn**
Vit koma saman á sjómans-heiminum mánadagin kl. 19.30.

**Møtir verða á Signabø í snikkaraverkstaðnum Buli**
Friggjakvøldið kl. 20.
Leygarkvøldið kl. 20.
Sunnukvøldið kl. 19.
Talarar: Poul Færø, Eyðfinn Reyðberg, Jákup N. Olsen og aðrir. Sangluttøka við systkjunum á Váli, Kvartettini í Betesda o.ø. Øll eru vælkomin.

**Glæman, Kvívík**
Missiónsvikan byrjar hós-dagin 4. jan., kl. 20 við møti við sangbólkinum Miktam.
Fríggjadagin 5. jan., kl. 20 er møti við Regin Høgnesen, trúboðara, og Hansina Johannesen syngur.
Missiónsvikan heldur áfram fríggjakvøldið 5. jan., kl. 20 við møti við Regin Høgnesen, trúboðara, og Hansina Johannesen syngur.
Leygardagin 6. jan., kl. 20 er møti við Regin Høgnesen, trúboðara, og Sonja Dávadótt-ir og Irena Jacobsen syngja.
Sunnudagin 7. jan., kl. 18 er møti við Reimund Langgaard og Gulak Hansen, Jónhilda og Gulak Hansen syngja.

**Saron Vestmanna**
Sunnudagin 7/1 morgunmøti við breyðbróting klokkan 11.
Mikudagin 10/1 bønarmøti í Saron, klokkan 20.
Hósdagin 11/1 barnaarbeiði í Saron, klokkan 19.

**Filadelfia, Miðvágur**
Hóskvøldið kl. 20 ungdóms-møti.
Sunnudagin kl. 12 nýggj-ársveitsla, øll eru vælkomin.
Mikukvøldið kl. 20 undir-vísing og bøn.
Hóskvøldið kl. 20 ungdóms-møti.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14.30
Einki møti verður sunnukvøldið vegna missiónsviku í Kvívík.
Bíbiltími verður týskvøldið kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21, Awake við Arna Abrahamsen.
Sunnudagin kl. 17, møti við Paula Høj. Barnamøti kl. 17.
Vælkomin í Kelduna
www.keldan.fo

**Missiónsvikan í Skálabotni**
***Hósdagur 4. januar***
kl. 20 Møti, Amundur Berthelsen talar. Menn av Strondum syngja.
Fríggjadagur 5. januar kl. 20 Møti, Frits Thomsen talar. Petur Hans og Thomas Dam syngja.
Leygardagur 6. januar kl. 20 Møti, Jónhilda og Gulak hava orðið. Innsavnan til Heimamissiónina.
Sunnudagur 7. januar kl. 18 Møti, Niels Jacob Nielsen talar. Hans Pauli og fleiri syngja.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnukvøldið 7/1-07 kl.13.30 verður sunnudagsskúli og kl. 19 verður møti við Arn-bjørn Kristiansen. Innsavnan til húsið. Eftir møti verður drekka. Øll eru vælkomin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 17 Møti.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Sunnudagsskúlin verður sunnudagin kl. 14.30, og møti er sunnukvøldið kl. 18. Øll kvøld í næstu viku verður bønarmøti kl. 19.30 í samband við alheims bønarviku.

**Siloa, Fuglafirði**
Nýggjársveitsla verður í Siloa leygarkvøldið kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Ritutvík**
Sudanringurin kemur saman týskvøldið 9. januar 2007 kl. 19. Øll eru vælkomin at vera við.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 14.30 verður sunnudagsskúli,
kl. 18 verður møti við Øssur Steinhólm og
kl. 21 verður ungdómsmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kfum og Kfuk, Klaksvík**
Sunnudagin kl.14 sunnu-dagsskúli, kl.17.30 bønarløta, kl.18 møti við Hanus Lassen.
Kl. 21 ungdómsmøti.
Mánakvøldið kl. 20 møtist sjómanskvinnuringurin.
Øll eru vælkomin.
www.kuff.fo

**Getsemane, á Brekku 19 Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 er ungdómsmøti við André Matras
Leygardagin kl.10.00 er morgunbøn
Sunnudagin kl.14.00 er møti við sunnudagsskúla
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunmøti

**Missiónshúsið í Skopun**
Fríggjadagin kl. 19 Jólaveitsla fyri vaksin. Øll eru vælkomin.
Sunnudagin kl. 14 sunnudags-skúli. Sunnudagsskúlakortini verða innheintaði. Kl. 17.30 Bøn- og lovsangur, kl. 18 Møti.
Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið á Sandi**
Festin fyri vaksin verður sunnudagin 7. jannuar kl. 18. Festin er fyri øll.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Jóla+sjómansfest verður 7. januar kl. 18. Øll eru vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Hóskvøld kl. 20 Bønarløta.
Fríggjakvøld kl. 20 Øll sam-koman samlast um luttakandi uppgávu- og ábyrgdarbýti.
Sunnudag kl. 14 Sunnudags-skúli. Kl. 17.30 Bønarløta.
Kl. 18 Evangeliskt møti.
Øll eru vælkomin í Frelsunarherin.
www.frelsunarherurin.fo

**Frá Meinigheitshúsinum í Vági**
Hátíðarhaldið í samband við 90 ára føðingardagin hjá Meinigheitshúsinum verð-ur hildið leygardagin kl. 19 saman við sjómannsveitsluni og veitsluni fyri eldri.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
Einki møti ella sunnudags-skúli verða sunnudagin vegna hátíðarhaldið leygardagin.
Lýst verður, tá byrjað verður aftur.

**Meinigheitshúsið, Vágur**
6. jan kl. 19, 90 ára hátíðar-hald og jóla- og sjómannafest
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sjómansheimið Ørkin Brautarholt 29, Reykjavík**
Hvønn sunnudag kl.17.00 og fram til mai 2007 er møti á Ørkini.

**Losjan í Havn Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin tann 5. januar 2007 kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00
Teldup.: tilhald@torshavn.fo
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.*
***Tilhaldið letur uppftur hósdagin 4. januar 2007.***
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Landsfelag Pensjónista**
Felagið heldur til í Tróndargøtu 13, Tórshavn.
Skrivstovan er opin hvønn týsdag frá kl. 13.00-16.00.
Tlf. 319394 ella 219394.
LP@email.fo

**Tilhaldið á Toftum**
*Tlf. 448690*
*Vit halda til í niðaru hædd á Vesturskin.*
*Teldupost: tilhaldnes@post.fo*
Opið er týsdag, mikudag og hósdag. Frá kl. 15.00 – 18,00
*Vit hava hvønn dag ein góðan drekkamunn, eins og vit hava nógv spøl, og annað ítriv.*
*Vit ynskja at øll kenna seg væl og hugnað sær.*

**Dagtilhaldið Vesturskin**
***Opið er týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00.***
***Týsdag*** - fimleikur
***Mikudag*** - Sangløta.
***Hósdag*** - ymist ítriv.
*Allar dagar er møguleiki at lesa bløðini og fáa sær ein góðan drekkamunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.*

**Dagtilhaldið Fløvi**
*í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum tlf. 448279.*
*Allir pensionistar hjartaliga vælkomnir.*
*Opið mánadag til fríggjadag kl. 15.00 – 18.00.*
Skrá viku 2.
***Mánadagur 8. jan.***
Fimleikur
***Týsdagur 9. jan.***
Telduhugni v. Jens Dalsgaard.
***Mikudagur 10. jan.***
Enskt v. Annette Gaardlykke.
***Hósdagur 11. jan.***
Myndaveving v. Gretu Olsen.
***Fríggjadagur 12. jan.***
Boccia.
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Ver vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Frá Dagtilhaldinum à Strondum**
Dagtilhaldið er opið hvønn týsdag og hósdag frá 15-18.
Møtast aftur 9.1.07.

**Luffistova í Fuglafirði**
Vit hava jólafrí.
Byrja aftur 9. januar.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag kl 14 –17. Báðar dagarnar er drekkamunnur at fáa. Eisini eru bløðini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Opið er:
Mánadag og mikudag kl. 13.30-17.30.
Týsdag og Hósdag kl. 9.30-17.30
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
***Mánadag***
Tilmeldan til døgurða týsdag áðrenn kl 17.00 á tlf. 459091
***Týsdag***
kl. 9.30 Gongutúrur
kl. 11.00 bløðini verða lisin fyri sjónveikum
kl 12.00 Døgurði
***Mikudag***
kl. 13.30 Telda
***Hósdag***
kl. 10.00 fimleikur
kl. 11.00 telda
kl. 13.30 bløðini verða lisin fyri sjónveik
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Silvurbrúdleyp**
Mánadagin 29. januar kunnu Arngerð og Mortan Mørk, Tórshavn, halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 3. februar kl. 19 á Hotel Føroyum. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 317136/269483 áðrenn 15. januar.